## VALGREINAR

# Valið er eitt JA ella eitt Nei !

**Bárður Nielsen**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Norðstreymoy*



Í Sosialinum verður Jóannes Eidesgaard endurgivin fyri at siga : " Tað undrar meg, at fólk framvegis eru so upptikin av, hvat Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin halda um ríkisfelagsskapin, tí kanningar vísa, at tað er loysnin hjá Javnaðarflokkinum í hesum máli, sum fjøldin tekur undir við."

Slíkar kanningar havi eg ongantíð sæð ella hoyrt um. Flestu kanningar, sum hava verið, siga NEI til loysing, og JA til ríkisfelagsskap.

Jóannes Eidesgaard sigur í sama blað, at Sambandsflokkurin sigur bara NEI, meðan Tjóðveldisflokkurin sigur JA.

Púra rætt ! Øll vita hvar Sambandsflokkurin stendur, og at hann sigur NEI til loysing. Øll vita eisini hvar Tjóðveldisflokkurin stendur, og at hann sigur JA til loysing

Tað sum fólk eru upptikin av, og tað sum flestu kanningar hava víst, er í góðum samsvari við hvat Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin siga, og tí átti formaður Javnaðarfloksins ikki at verið so bilsin.

Í fýra ár hava vit havt eina samgongu, sum vildi loysa frá fyrsta degi, og mál hennara er framvegis loysing, og tískil er aðalspurningurin hesaferð um vit skulu siga ja ella nei til samgongunar ætlan – um vit skulu siga JA ella NEI til loysing

Velji eina trygga og frælsa framtíð, set X við lista B

# Høgni Hoydal tosar sum um føroyingar ikki eru til

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Høgni Hoydal man vera einasti føroyski politikari, sum hevur kent eina trongd at skriva eina grein fyri at heita á luttakarar í politiska tjakinum um at føra eitt siðuligt valstríð. Fyri øll okkum onnur hevur hetta verið ein sjálvfylgja.

Tað valevnið íð tykist at liggja eina longst frá hesum áminningum er Høgni Hoydal sjálvur.

Meðni hesi orð verða skrivað er ein lýsing í Útvarp Føroya um tjóðveldiscafé í losjuni í Gøtu. M.a. luttekur Høgni Hoydal og skal tosa um evnið: Hvussu forða vit hinum flokkunum í at tøma landskassan? Ein yvirskrift, sum í mínum oyrum er so insinuerandi, at man hveppist við. Hon kann í hvussu so er ikki koma undir heitið siðuligt valstríð og kann í besta fall provokera onkran annan til at seta spurningin um, hvussu vit forða Høgna Hoydal og Tjóðveldisflokkinum í at fara í lummarnar á fólki.

Í orðaskiftum í fjølmiðlunum gongst illa hjá øðrum luttakarum at fáa orðið. Ótrúligt at nakar kann tosa so leingi uttan at lata onnur koma framat, men lítið siðuligt.

Høgni Hoydal tosar sum um føroyingar ikki eru til, ja, sum eingin annar er til.

# Fólkið fyrst - ítøkiligur eldrapolitikkur

**Katrin Dahl Jakobsen**
*valevni og løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin*



Ongin av flokkunum, ið bjóða seg fram, hava ítøkiligt boð upp á ein eldrapolitikk – **uttan Javnaðarflokkurin.**

Onkur sigur at krónurnar mugu bíða, til vit síggja, um tað verða nakrar krónur til tey eldru. Aðrir mugu hava betri tíð at hugsa seg um. Sitandi samgonga brúkti 4 ár at hugsa seg um – og teir hugsa enn!

**Hetta gera vit:**
Javnaðarflokkurin fer, kemur hann í samgongu, at syrgja fyri at
- 160 ellis/røktarheimspláss verða bygd næstu fýra árini
- fáa døgnrøktarskipan í lag
- eftirlønin verður 10.000 kr til støk og 16.000 til hjún um mánaðan.

**Hetta gjørdu tey:**
Í samgonguskjalinum hjá verandi samgongu vóru mong gylt lyfti til tey eldru. Ikki eiti á alt, sum skuldi fremjast.

Og nú mugu vit kunna loyva okkum at spyrja, havt kom burturúr? Hvussu mong røktarheimspláss vórðu bygd? Tey lovaðu mín sann bæði at veita "eina trygga og rætttvísa eftirløn".Tey lovaðu at "loysa trupulleilleikan við væntandi røktarheimsplássum".

Eru tey loyst? Ella var hetta fyri tykkum eingin trupulleiki?

Men snildisliga hava tey telvað, hóast alt. Beint undan valinum fáa tey gomlu ein kekk upp á heilar 1200 kr. Hetta er pensjónshækking, sum fíggjarmálaráðharrin hevur hjálpt teimum gomlu at spara saman frá 1. jan í ár. Onkur kundi jú funnið uppá at brúkt mánaðarligu hækkingina so hvørt, ella kanska onkur var so gloymskur, at gloyma, hvaðani peningurin kom, og tá atkvøtt fyri "skeivum" flokki. Mangt verður í neyðini nýtt!

Tað heilt stóra á eldraøkinum varð lagt fram nú um dagarnar. Tjóðveldisflokkurin lovar nú, at tað skal knæsetast við lóg, at tað skal vera ein **rættur** at fáa røkt! og eina sømiliga eftirløn á ellisárum! Fyri javnaðarfólk hevur tað altíð verið **sjálvfylgja**. At tað nú skal vera neyðugt at lóggeva um, at ávísir samfelagsbólkar skulu hava fyri neyðini at fáa tryggjað sjálvsøgd manssømilig kor gjøgnum lógarverkið, kann bara spretta úr tunnum mergi. Og serstakliga tá hetta kemur frá einum flokki, sum sigur seg hava sum høvuðsendamál at skapa føroyingum øllum góð og livilig kor! Og serstakliga, tá tað kemur frá tí flokkinum, sum bardist sum úlvur á skóg ímóti fólkapensjónini, tá Petur M. Dam kom við henni á sinni.

Tað er tann bera luft at siga, at man vil betra um korini hjá teimum gomlu. Nú **skulu** tøl setast á! Nú **skulu** raðfestingar gerast fyri tey eldru, frá fyrsta degi. Ikki upp undir val, men fyri øll 4 árini. Tað er bara Javnaðarflokkurin, sum torir. Tí vit meina tað.

# Sjálvtøkuborðið anno 2002

**Ása Olsen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Valstríðið hesaferð minnir alt ov nógv um valstríðið í 1990, tá ið flokkar yvirbjóðaðu hvønn annan við óseriøsum lyftum, ið tá avtornaði onki hald var í.

Nú vit hava strítt okkum ígjøgnum kreppuna, ið eisini kom m. a. orsaka av yvirnýtslu, so sóknist eg eftir sakligheit og spyrji meg sjálvan, hava hesir somu politikkarar onki lært enn?

Á jú, vit skulu hava eitt sera væl virkandi sjúkrahúsverk, har bíðitíðin til tær ymisku kanningarnar /viðgerðirnar er so stutt, at tað ikki nervar sjúklingin. Vit skulu eisini hava eitt heilsuverk, ið virkar optimalt.

Vit skulu kunna bjóða teimum gomlu tær best møguligu sømdir. Bæði tey, ið hava brúk fyri røkt, og ikki minst tey, sum enn eru í egnum heimi, skulu hava møguleika fyri døgnrøkt. Tey ungu skulu hava best møguligar umstøður, bæði viðvíkjandi bústaði, barnaansing, skúla og frítíðarítrivi og líknandi.

Vinnan skal hava best møguligar karmar at virka undir.

Ja, eg kann halda fram við at nevna øll tey viðurskiftir, ið eg kundi hugsað mær vóru á einum optimalum støði. Men onki av hesum kann gerast eftir einum degi, men er tað okkara mál sum flokkur, at arbeitt verður bæði væl og virðiliga fyri at røkka hesum málum komandi valskeiðið.

Eg meti heldur ikki, at vit nú í einum valstríði kunnu fara inn og seta krónur og oyrur á nakað, tí at við einum so viðbreknum búskapi sum okkara, vita vit ikki, hvat vit koma at hava av pengum at arbeiða við tey komandi fýra árini.

# Til lukku og góða heimferð

**Jákup Olsen**
*formaður í Suðuroya Fólkafloksfelag*



Hetta vóru orðini, útvarpsmaðurin segði nú fyri einari løtu síðan við stjóran Reidar Nónfjall, nú landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm hevur undirritað sáttmálan um nýggjan Smyril í Spania, har Reidar Nónfjall og Arni Poulsen hava kontrasignerað.

Eg fari hervið vegna Fólkaflokkin í Suðuroy at takka Landsstýrinum, Løgtinginum og øllum Føroya fólki fyri at hava tikið undir við hesum álvasmáli, sum hevur ligið okur øllum suðuroyingum so nógv á sinni at fáa framt.

Tað hevur verið ein álvarsløta í Spania, tá ið undirskrivast skuldi, og eg haldi, at tað hava verið 3 fegnir føroyingar, sum hava ført pennin.

Í skrivandi løtu stevnir Smyril inn Vágsfjørð, og fegnist eg saman við øllum suðuroyingum um, at sáttmálin til nýggjan Smyril nú er undirskrivaður, tí fyrrenn tað varð gjørt, var einki vist um nakað nýtt skip. Okur venda eisini tonkunum til hetta gamla skip, sum nú leggur til kei her í Vági, og sum hevur tænt okur so væl síðan 1975.

Tað var eisini eitt risastig tá at taka at keypa Smyril. Munurin var stórur frá Dúgvuni, ið tók 5 bilar á fordekki, til hendan Smyril, sum tekur 120 bilar. Tíðirnar broytast – tíbetur kann ein siga. Í dag er ein stórur partur farmur, sum stendur á dekkinum – bæði til Havnar og eisini suður úr Havn, so tíðin er farin frá hesum Smyrli, vit hava í dag. Sjálvandi eiga suðuroyingar fyrst og fremst at virka fyri øllum sínum málum, so tøkkin skal ljóða til allar góðar kreftir, sum hava staðið saman um Smyrlamálið.

Í dag skal uppstillingin til løgtingsvalið fáast til formannin í valstýrinum, so nú fara okur í Fólkaflokkinum við góðum treysti við okra lista.

Til sendinevndina: Hjartaliga til lukku og góða heimferð.



## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkurin er sera skaðiligur, serliga í Havnini

**Marjus Dam**
*Sambandsflokkurin*



Ein atkvøða fyri loysing er hjá mongum, serliga í Havn, ein atkvøða fyri egnari uppsøgn.

Hevur tú í atkvøður loysing hugsa um tað. Tygum sita ídag í einum heitum arbeiðsplássi við góðari inntøku, og megna at gjalda hvørjum sítt. Hvat hendir, um ongin inntøka verður, ella inntøkan minkar nógv? Hvat hendir um maðurin ella konan ella bæði missa starvið - orsakað av loysingini?

**Tjóðveldi burtur:**
Vit eru øll góð við høvuðsstað okkara. Tað undrar almikið, at Tjóðveldi er størsti flokkur har. Í Tórshavn átti hesin flokkur at mist alla umboðan á Løgtingi. Tí serliga í hesum øki er flokkurin beinleiðis skaðiligur. Tí júst í høvuðsstaðnum átti Sambandsflokkurin at verið NÓGV tann størsti flokkurin.

**Ríkisveitingin og Havnin:**
Vit vita øll, at ein sera stórur partur av ríkisveitingini verður nýttur til alment virksemi. Tað merkir, at mangir av almennu stovnunum eru tengdir at ríkisveitingi. Somuleiðis vita vit, at nógv avleitt privat servicu virksemi, krambúðir av alskyns slagi, so sum teldufyritøkur, timburfyritøkur, klædnabúðir, matvørubúðir, handverkarar o.a. verða raktar hart, um almenni sektorurin verður skerdur.

Liggur ikki stórur partur av almenna virkseminum júst í Havn?

**Hvítabók og Havnin:**
Sambart Hvítubók, so er almenni sektorurin størri enn hann eigur at vera, orsaka av ríkisveitingini. Vinnan megnar ikki at bera almenna sektorin sum hann er ídag. Men við ríkisveitingini hava vit møguleika at hava ein stóran almenna sektor. Hóast sera nógv róparí frá fullveldissamgonguni, so hava teir ikki tora at skert almenna sektorin. Teir kallaðu tað at gera ein "føroyskan leist". Tí so fór loysingin í sor beinanvegin, fólk sóu avleiðingarnar. Og ikki tordu teir at siga fólki veruleikan, nevniliga at ein stóru partur av serliga almennum virksemi í Havn kom at senda fólk út í arbeiðsloysi - og avleiðingum av hesum - sum vit minnast so væl frá kreppuni.

**Loysing og Havnin:**
Loysingin merkir, at ríkisveitingin skal burtur eftir stuttari tíð. Arbeiðsloysi fer helst at náa hæddir, í eru verri, enn tá kreppan leikaði harðast. Tað kann loysingin hjá núsitandi samgongu bjóða serliga havnarborgarum. Tað er tann reella ræðumyndin. Tað er veruleikin.

**Samband og Havnin:**
Í ríkisfelagsskapinum hava vit ikki hendan trupulleika. Tað verða ongar uppsagnir orsaka av loysingarørskapi. Tað sóu vit eisini í kreppuni, har serliga almenni sektorurin ikki kollapsaði. Men tvørturímóti var við til at hála alt annað ígongd aftur. Í loysingini verður tað hesin sektorur í fær skrædlið - og uppsagnirnar. Og almenni sektorurin er so stórur, at hann fer at hála privata virksemi við sær í fallinum. So loysingarkreppan verður nógv verri enn kreppan í 1992. Hesaferð fýkur alt um koll. Og fólk fara aftur at stinga í sekkin - med alla.

**Samband og Loysing:**
Sannleikin og veruleikin eiga fram. Loysingin er eitt sera ringt val hjá føroyingum øllum. Serliga har í almenna virksemi er stórt. Men eisini á bygd koma avleiðingarnar at vera ræðuligar, tí um okkara høvuðsstaður kollapsar, verða allar Føroyar hart raktar. Tað má ikki henda.

Tí má atkvøðast trygt.

Vit hugsa um frælsi og framtíðina hjá tær.

Vit vilja ríkisrættarligar broytingar í ríkisfelagsskapinum

Vit hugsa um Føroyar.

X fyri Sambandsflokkinum.

# Aftursvar til Eyðólv Dimon

### Til grein hansara um Sambandsfloksins leiklut í skerjingini av blokkinum.

**Johan Dahl**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Góði Eyðólv
Tað er sera umráðandi, tá ein skrivar grein, sum tann tú gjørdi í seinasta Sosialinum, at hon kann prógvast og ikki er ein lygisøga við eittans endamái - at royna at flyta stemmur frá Sambandsflokkinum til Javnaðarflokkin.

Sambandsflokkurin var EINASTI flokkur sum ikki vildi skerja blokkin, tí vit mettu tað verða óforsvarligt, tí nógv er á láni at gera aftan á kreppuárini, sum krevur stórar íløgur - t. d. innan eldrarøkt, heilsuverk, vegakervi osfr.

Eg og mong við mær kenna ein annan flokk, sum mælti til at skerja blokkin við 107 mio krónum, sum svaraði til teirri upphædd, sum blokkurin var prístalsviðgjørdur – nevniliga TÍN flokkur.

Tað skilagóða í hesum uppskoti vil eg lata onnur døma um.

Halt teg til veruleikan – tað man verða frægast í longdini.

Blíðar heilsanir.

# 1. partur: Havnin og politiska nalvaskoðanin!

**Hans Birgir Hansen**

Tað er nóg í upptekur ein, tá Havnin fær politiska nalvaskoðan við øllum teimum í havast at Havnini, í breyðføðir, klæðir avbygdar/býar/fremmandafólki.

Tað er Havnin, ið skapar fortreytir/grundarlagi fyri bygdar/økismenning gjøgnum arbeiðir, lestnað, lærdóm, áðurnevndu fáa sær í Havnini í dag.

Tað er miðspjaðing av miðfyrisitingum í Havnini, sum vit skulu skipað fyri at fáa deildir/eindir skipað undir eina lon úti á okkar útjaðaraoyggjum.

Tað er ikki minst galdandi miðspjaðing av øllum handilslívi, vinnulívð, ídnaði, flutningsvinnu, tænastuvinnu, barnaansing, eldrarøkt, skúlar, læripláss v.m.

Tað er tá, at vit kunnu spara avbygdar/býar/fremmandafólki at skula ferðast morgun og kvøld í vikuni í millum okkara útoyggjar og Havnina.

Tað er ein felagsnevnari, sum avbygdar/býar/fremmandafólk/flóttafólk hava sum tilflytarar til Føroyar og til Havnar síðan fyrst í sjeyti árunum.

Tað kann ikki sigast annað enn, at nógv avbygdar/býar/fremmandafólk munna ásanna, at ein hevur grein í sínum máli, at soleiðis er støðan.

Tað er umráðandi at fáa lands-/kommunalpolitikarar at arbeiða fyri, at heimstaðar kommunur fáa somu lívsmøguleikar sum Havnin.

Tað er avgerandi neyðugt, at lands-/kommunalpolitikarar fáa hesi at flyta út aftur til heimstaðar kommunurnar, ið tørva ófaklærd/faklærd.

Tað hevði verið uppá tíðina, at havnarfólk tóku eitt annað skinn um bak, vilja tit framhaldandi tryggja tykkum lívsmøguleikar í Havnini.

Tað eru áðurnevndu og fólka/miðnámsskúlanæmingar, lesandi føroyingar ein finst at.

# Hvussu prioritera vit - og hvat?

**Katrin Jønsson**
*valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Tað hevur leingi verið átroðkandi neyðugt at útbyggja skúlan í Nes Kommunu, men tað ið er mest átrokandi er fimleikarhøllin. Fimleikarhøllin hevur verið óbroytt síðani 1958, og er nú vorðin ov lítil, ov niðurslitin - hon er ótíðarhóskandi. Tað ljóðar at verandi fimleikarhøll skal útbyggjast, men hvat við at hugsa meira breitt?

Ein sunn sál í einum sunnum kroppi verður sagt og er tað eisini rætt. Tað er ein spurningur um tað ikki fekst meira fyri pengarnar, kann verða at tað kostar nakrar kr. meira nú, men hugsa vit um at fleiri kundi komi og rørt seg og roynt seg, hevði tað verið eitt gott ískoyti til fólkaheilsuna.

Nes-Kommunu eigur tí at kannað møguleikarnar, at gera eina Ítróttar-& samkomuhøll ístaðin fyri at útbyggja verandi fimleikarhøll. Tá hevði man fingið fleiri flugur fyri ein smekk, og eitt høli ið var til gleði fyri allar borgarar í kommuni, og eisini skúlabørn.

Aftrat teimum møguleikum ið longu eru í Nes Kommunu, hevði tað verið gott við eini høll ið lýkur altjóða krøv, samstundis sum ein breiðari skarið kundi fingið gleði av at roynt ymiskt annað.

Møguleiki hevði tá verið fyri fleiri ítróttargreinum:

1. Fótbólt
2. Hondbólt
3. Basketbólt
4. Tennis
5. Badminton
6. Venjingarhølir ( venjingarhølir v/ ymiskum rørslumaskinum)
7. Samkomkuhøll fyri stór tiltøk.
8. Børn vaksin og eldri, kundi fingið møguleikan, at komi at rørt seg, ella kanska samlast kanska kafeteria, e.a.

Vit hoyra nógv um misbrúk av ymsum slag, serliga ímillum tey ungu, fleiri sjúkur uppstanda tí børn og vaksin sita ov nógv. Vit eru í TK tíðini, tíðir eru broyttar bæði hvat viðvíkir arbeiði og spæli, og hetta kann hjálpast uppá, um vit hava aðrar møguleikar.

Vit kunnu hyggja at Skála, Runavík har eru hallirnar so nógv upptiknar, at ikki er møguleiki hjá øðrum at koma framat, tað vísir seg at tá umstøðurnar verða betri, veksur tørvurin. Tað er gott tá tað er gott fyri fólk.

Í Nes kommunu er eitt virkið arbeiði gjørt hjá ítróttarfelagnum, svimjifelagnum, í missiónshúsinum og samkomum við fleiri ymiskum barna- og ungdómstiltøkum. Hetta stóra arbeiði er gjørt við frívilligari arbeiðsmegi, ið er til stóra gleði fyri nógv børn, ung og foreldur teirra.

Tað er so ymiskt hvussu áhugin er, tí má eitt breitt tilboð vera, so eingin skal noyðast út í misbrúk, ella harðskap fyri at dekka sín tørv fyri upplivingum.

Tað er vanligt aðrastaðni, at skúlanæmingar flyta seg ímillum skúla og ítróttarhøll ella svimjihyl, so hví ikki í Nes Kommunu

Hetta hjartasuff var til Nes Kommunu, men vitandi at fleiri hallir eru í Eysturoynni og eru tær so nógv brúktar, at ikki er pláss fyri øðrum at leiga seg inn. Tí er tankin er tann, at kunna tey kunnu vit eisini, um okkara nøkulunda eins møguleikar skulu verða fyri øll.